GJALDSTOVAN

# Útbjóðingarskriv

## Leitað verður eftir einum veitara at hjálpa Gjaldstovuni við heimasíðusmíð, UX/UI, grafiskum uppgávum og miðlan.

## Um Gjaldstovuna

Á Gjaldstovuni slóða vit fyri, at almennu Føroyar eru millum mest effektivu og dugnaligu fyrisitingarnar. Vit menna loysnir innan KT, roknskap, lønir og talgilding.

Vit eru stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Vit arbeiða miðvíst við at skapa tryggar, gjøgnumskygdar og nýmótans skipanir, og vit leggja stóran dent á standardisering og miðsavning av tænastum og mannagongdum.

Okkara virksemi fevnir um sjey høvuðsøki:

- **KT Landsins** - Mennir og rekur kt-kervi og tænastur til almennar stovnar og skúlar.
- **Løn & Bókhald Landsins** - Umsitur lønir og útgjøld við nærlagni og ábyrgd.
- **Búskaparskipan Landsins** - Veitir amboð til skynsama fíggjarstýring.
- **Landsroknskapurin** - Hevur yvirskipaðu ábyrgdina av landsroknskapinum og tryggjar eina effektiva umsiting.
- **Keyp Landsins** - Fremur kappingarført innkeyp umvegis Keypsportalin.
- **KT Trygd** - Tryggjar at kt-kervini lúka lóggávu og góðar siðir.
- **Talgildu Føroyar** - Mennir talgildar tænastur til borgarar, vinnu og landið.

Vit eru umleið 70 starvsfólk við høvuðssæti í Albert Hall á Argjum og skrivstovu í Klaksvík. Vit leggja dent á fakliga menning, góðar arbeiðsumstøður og trivnað.

## Okkum tørvar

Fyri Gjaldstovuna hevur tað týdning, at tað, vit miðla, verður fatað og skilt beinanvegin. Tað hevur týdning, at miðlingin er álítandi og greið. Bæði tá ið talan er um útgávur, skipanir og talgildar tænastur. Okkum tørvar ein veitara, sum kann veita okkum fylgjandi tænastur, fyri tímaløn:

- Ráðgeving um miðlan
- Sniðgevan/grafikarar
- Heimasíðumennarar/forritarar
- UX/IU fólk
- Samskipan (kundaráðgevi)

Á Gjaldstovuni eru starvsfólk, sum hava flest allar av nevndu førleikum. Uppgávurnar eru tó fleiri enn til starvsfólkini hjá okkum.

Vit ímynda okkum at tímanýtslan er umleið 400-600 tímar um árið, møguliga meira fyrstu tíðina. Hetta er ein meting.

Meginreglan er, at komandi veitarin hjálpir Gjaldstovuni við øllum uppgávum. Undantøk kunnu tó koma fyri. Eitt nú tá Gjaldstovan saman við stovnum og/ella samstarvsfeløgum fer undir felags átøk. Tá kunnu vit ikki binda onnur til okkara veitara. Eisini hevur Gjaldstovan onkrar avtalur um uppgávur, sum eru í gongd, og sum vit meta, at veitarin, sum fekk uppgávuna upprunaliga, førir uppgávuna á mál.

Filmsframleiðsla, "influensari", framleiðsla av prenti og deko, tekstframleiðsla, myndatøka og líknandi veitingar eru ikki partar av hesum útboði, men partarnir kunnu avtala aðrar veitingar so hvørt.

## Uppgávurnar

Vit hugsa okkum, at talan verður um eitt samstarv, har veitarin verður partur av okkara virksemi í sáttmálatíðarskeiðnum. Hetta merkir, at vit ikki kunnu neyvt lýsa allar uppgávur, sum veitarin verður partur av.

Tó eru uppgávur, sum vit síggja fyri okkum, at vit samstarva um:

- Dagføra samleikan hjá Gjaldstovuni. Núverandi samleiki er gamal. Hann hóskar ikki væl til talgilt samskifti og fevnir ikki um samlaða virksemið hjá okkum.
- Sum partur av dagførda samleikanum vilja vit menna eitt brand hiearaki. Gjaldstovan umsitur nógv virkisøki og veitir nógvar tænastur til stovnar, t.d. Landsnet, Skúlanet, Skjalhald og BSL. Veitarin skal luttaka í greining av hesum tænastum og gera uppskot til eitt brand hierarki, sum hóskar til virksemið á Gjaldstovuni.
- Gjaldstovan skal hava nýggja heimasíðu, sum skal verða ein høvuðssíða fyri øll virkisøki hjá Gjaldstovuni.
- Gera nýggja heimasíðu til keypsportal.fo. Gjaldstovan mennir umsitingarpartin av Keypsportalinum, har stovnar skráseta síni útboð. Hetta verður gjørt í BSL umhvørvinum. Veitarin skal menna ein útboðsportal, sum líkur nýtíðar krøv til CMS og talgilda atkomu. Veitarin skal leiða greiningar tilgongdina. Veitarin skal menna eitt API, sum samskiftir við back office.
- Dagføra snið á kt-veitingum saman við okkara mennarum, eitt nú Búskaparskipan Landsins og Billing skipanina hjá KT Landsins. Nógvar av okkara skipanum hava tørv á fáa eitt skarpari grafiskt snið, sum stuðlar undir brúkaravinsemi og atkomu.
- Framleiðsla av miðlatilfari til m.a. lýsingar, sosialar miðlar, uppseting av frágreiðingum, framløgum og brævpappíri.
- Gera sniðhondbók, sum lýsir okkara yvirskipaða snið og meginreglur

## Sáttmáli og karmar

Skipað verður fyri einum kunnandi fundi tann týsdagin 10. juni kl 9.30. Starvsfólk á Gjaldstovuni greiða frá okkara virksemi og okkara avbjóðingum. Eisini koma vit inn á ráttmálan, útboðið og tilgongdina at finna okkara nýggja samstarvsfelaga.

Veitarar, sum vilja luttaka á kunnandi fundinum, skulu boða frá luttøku við at senda teldupost til keypsportal@gjaldstovan.fo

## Sáttmáli og karmar

Ein sáttmáli verður gjørdur við eitt felag ella samtak, sum skal bjóða fram navngivin starvsfólk, sum hava allar teir førleikar okkum tørva, umframt ein samskipara fyri sáttmálatíðarskeiðið. Um eitt samtak bjóðar seg fram, so er tað ein fyrimunur, at veitarar í samtakinum hava samstarva saman áður og kunnu vísa á, at teir hava eitt vælvirkandi samstarv.

Veitarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiði sambært tímaprísinum, ið veitarin bjóðar í sínum tilboði. Um prísurin er ymiskur fyri ymisk starvsfólk, so skal hetta upplýsast.

Tey starvsfólk, sum felagið ella samtakið, ið vinnur útboðið, setur á hesa uppgávu, skulu sum útgangsstøði ikki skiftast út. Vísir tað seg, at samstarvið við veitaran ella ávíst starvsfólk hjá veitaranum ikki er nøktandi, tilskilar Gjaldstovan sær rætt til at kunna skifta starvsfólk.

Sáttmálatíðarskeiðið er 1 ár við møguleika fyri at leingja upp í 3 ár, um báðir partar vilja tað.

Prísvøkstur kann samsvara lønarvøkstrinum, tó ikki fyrsta árið.

Rokningin skal vera talgild í vanligum oio-xml formati.

Uppskot til sáttmála hjálagdur.

## Krøv til tilboðið

Tilboðið frá veitara skal fevna um:

- CV hjá ráðgevunum við kunning um førleikar, útbúgving og royndir frá teimum seinastu 5 árunum. Í CV'num skulu líknandi avrik/tilvísingar við góðum úrsliti vera tilskilað.
- Tímaprísur/samsýning fyri veitingar fevnd av hesum tilboði.
- Ráðgevarnir skulu í minsta lagi hava 2 ára skjalprógvaðar royndir. Hetta er eitt minsta krav.
- Veitarin skal upplýsa hvørja CMS skipan Gjaldstovan fær bjóðað. Tað er eitt minsta krav, at CMS skipanin er brúkaravinarlig, lýkur neyðug trygdarkrøv (eitt nú tvey faktor innritan) og kann taka atlit til talgilda atkomu. Dømi um eina skipan, sum, Gjaldstovan metir, lýkur hesi krøv, er Umbraco. Hetta merkir tó ikki, at Umbraco fær ein fyrimun, men at vit krevja, at tann CMS skipanin, sum verður boðin Gjaldstovuni, er á sama støði ella betri enn Umbraco.
- Veitarin skal koma við uppskot til hvar heimasíðan verður hýst og til hvønn kostnað. Veitarin skal upplýsa kostnað, um Gjaldstovan velur at hýsa heimasíðuna á øðrum stað. Gjaldstovan tekur avgerð um hvar síðan verður hýst.

Tilboð sum ikki lúka minsta krøv verða ikki tikin við.

## Hvussu verður vektað

Innkomnu tilboðini verða vektað soleiðis:

- Góðska 50%
- Prísur 50%

Útrokningin fer fram á henda hátt:

**Góðska**
Førleikar, útbúgving og royndir hjá ráðgevum við líknandi uppgávum.

Út frá eini samlaðari meting av førleikum, útbúgving og royndum hjá teimum 2-3 ráðgevunum verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal. Tá dómsnevndin metir um veitaran, verður hugt eftir góðum skapanarevni og høgum serkunnleika. Hugt verður eftir, hvussu dómsnevndin metir, at veitarin fer at megna uppgávuna at verða veitari hjá Gjalstovuni. Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku, t.e. hvørja meting Gjaldstovan hevur av innkomna tilfarinum.

**Prísur**
Tilboðið við lægsta samlaða tímaprísi fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:
Tilboð við lægsta tímaprísi/tímaprísur í tilboði, ið skal metast x 50

Lægsti tímaprísurin í frymlinum er 500 kr., t.e. at bjóðar ein veitari lægri enn 500 kr. um tíman, verður tímaprísurin ásettur til 500 kr. í útrokningini.

Um eitt felag hevur ymiskar tímaprísir fyri ymisk starvsfólk, so verður hetta útroknað út frá einari hugsaðari ársnýtslu t.d.:

60 tímar ráðgeving um miðlan x tímaprís
60 tímar sniðgeving x tímaprís
80 tímar forritan av heimasíðu x tímaprís
60 tímar av UX/UI x tímaprís
40 tímar av samskipan x tímaprís

= SUM / 300 = miðal tímaprísur

Gjaldstovan setur eina dómsnevnd at meta um innkomnu tilboðini. Í henni sita umboð fyri leiðsluna, starvsfólk sum arbeiða innan øki og Keyp Landsins.

## Dømi um útrokning

Góðska
Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí ráðgevararnir hava fáar og ikki so viðkomandi royndir og førleikar, hava ikki viðkomandi útbúgving, og tí veitarin hevur eina minni góða skipan. Hesin fær 20 stig.
Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir, førleikar, útbúgving og skipan eru á einum miðalgóðum stigi. Hesin fær 35 stig.
Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí ráðgevararnir hava tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnir, útbúgvingina og ta bestu skipanina. Hesin fær 50 stig.

**Prísur**
Tilboð 1: Tilboðið við lægsta miðal tímaprísi frá veitara er 500 kr. Hetta gevur 50 stig.
Tilboð 2: Næst lægsta tilboðið er 650 kr. Hetta gevur 500/650 x 50 = 38,5 stig
Tilboð 3: Trið lægsta tilboðið er 800 kr. Hetta gevur 500/800 x 50 = 31,5 stig

Samlað meting
Tilboð 1: Førleikar 20 stig + miðal tímaprís 50 stig = samlað meting á 70 stig.
Tilboð 2: Førleikar 35 stig + miðal tímaprís 38,5 stig = samlað meting á 73,5 stig.
Tilboð 3: Førleikar 50 stig + miðal tímaprís 31,5 stig = samlað meting á 81,5 stig. Hesin veitarin gerst sostatt vinnari av útboðnum.

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

## Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreytirnar.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing um avgerðina, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

# Hentar upplýsingar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar. Spurningar skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**

Kunnandi fundur er týsdagin 10. juni kl. 9.30 – boða frá luttøku á keypsportal@gjaldstovan.fo

Spurningar, ið eru settir fyri týsdagin 10. juni kl 13.00, verða svaraðir í seinasta lagi mikudagin 11. juni, kl. 16.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og svar kunnu síggjast dulnevnd á keypsportal.fo

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði

Freist **mánamorgunin 16. juni 2025 kl. 10.00**

Tilboð skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**